# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg gleði meg til at fáa lut í hesum avbjóðandi, men samstundis eisini spennandi ævintýrinum*
*(Hillary Clinton)*

## Forsætisráðharrin útihýstur frá politikki

**Teilendski forsætisráðharrin, Somchai Wongsawat, skal halda seg burturi frá politikki tey næstu fimm árini. Avgerðin hevur økt spenningin í Teilandi**



*Somchai Wongsawat skal halda seg burtur frá politiskum arbeiði tey næstu fimm árini*
*(Mynd: Reuters)*

Ovasti dómstólurin í Teilandi, grundlógardómstólurin, kunngjørdi í nátt, at teir tríggir flokkarnir í stjórnarsamgonguni skulu upploystast, og tað ber so í sær, at sjálv stjórnin fær somu lagnu. Grundgevingin fyri avgerðini er, at sambært dómstólinum framdu flokkarnir svik á seinasta tjóðartingsvali.

- Úrskurðurin skal leggja lunnar undir tað politiska støðið, segði formaðurin í grundlógardómstólinum, Chat Chalavorn, tá hann hevði kunngjørt niðurstøðuna.

Úrskurðurin ber í sær, at 36 leiðandi limir í landsins politisku leiðslu og teirra millum Somchai, forsætisráðharri, verða útilokaðir frá teilendskum politikki í fimm ár. Tað samsvarar væl við kravið frá mótstøðurørsluni PAD, sum hevur kravt stjórnina frá, og at forsætisráðharrin verður ákærdur fyri svik.

Somchai hevur alla tíðina havnað kravinum um, at hann og stjórnin skulu leggja frá sær, og hansara grundgeving er, at stjórnin er lógliga og demokratiskt vald.

### Undir øðrum navni

Teirm limirnir í stjórnarflokkinum, sum framvegis kunnu virka politiskt, hava longu boðað frá, at teir fara at stovna ein nýggjan flokk, og at Teiland fær nýggjan forsætisráðharra í næstu viku. Ein talsmaður hjá stjórnarflokkinum segði í morgun, at samgongan verður sitandi, men undir øðrum navni enn higartil.

Politiskir eygleiðarar í Teilandi siga, at úrskurðurin hjá grundlógardómstólinum økir vandan fyri samanbrestum millum mótmælisfólk og viðhaldsfólk hjá Somchais. Ta seinastu tíðina hava fleiri túsund mótmælisfólk skipað fyri fleiri tiltøkum ímóti stjórnini, men í morgun vóru fleiri túsund viðhaldsfólk hjá stjórnini í gøtunum í Bangkok, skrivar Reuters.

Tá hevði grundlógardómstólurin kunngjørt sín úrskurð, og væl mannað trygdarlið stóðu á varðhaldi uttan fyri dómhúsið.

## Venezia stendur undir í vatni og vil ikki hava ferðafólk

**Tann væl umtókti frítíðarbýurin stendur undir í vatni og vil tí ikki hava fólk á vitjan nú**



*Fólk vaða upp til kníggja í vatni í gøtunum í Venezia*
*(Mynd: AP)*

Tey, sum hava hugsað um at fara til Venezia at ferðast, eiga at hugsa seg um eina ferð afturat, tí fyri fyrstu ferð í mong ár vil ferðavinnan í tí kenda frítíðarbýnum ikki hava fremmand ferðafólk.

Orsøkin er, at Venezia stendur undir í vatni, og at vandi er fyri teirri ringastu vatnflóðini í meiri enn 20 ár. Tí hevur stjórin fyri ferðavinnuni í býnum nú mælt fremmandafólki frá at koma á vitjan, sigur BBC.

Tað er ein samanrenning av óhepnum umstøðum, sum hava lagt Venezia undir í vatni. Í fyrralagið hevur tað regnað illa, og í øðrum lagi hevur vindurin ligið inn á land við tí úrslitið, at nógvur sjógvur er trýstur inn ímóti býnum.

Tí ganga frólk nú upp undir knæ í vatni, og á tí kenda Markusartorginum stendur vatnið ein metur oman fyri sjálvt torgið. Gjáramorgunin vístu mátingar, at í støðum stóð vatnið meiri enn hálvan annan metur oman fyri tað vanliga.

Venezia er eitt av støðunum á varðveitingarlistanum hjá UNESCO, og italsku myndugleikarnir hava roynt ymisk tiltøk fyri at verja býin ímóti vatnflóð. Men enn er tað so ikki nóg mikið.

### STUTT SAGT

#### Spanska bilasølan uppsteðgað

Í Spania hevur fíggjarkreppan sett síni týðiligu spor, og har eins og aðrastaðni eru tað millum annað bilasølurnar, sum fáa sviðan at kenna fyrst. Felagið hjá sponsku bilasølunum kunngjørdi í gjár, at bilasølurnar seldu 50 prosent færri bilar í november enn í sama mánaði í fjør, og hetta er tað næststørsta fallið í landinum nakrantíð.

Broytingin kemur kortini ikki óvart á sponsku fjølmiðlarnar. Teir vísa á, at Spania er millum tey londini, sum eru meinast rakt av fíggjarkreppuni. Fyrst minkaði virksemið í byggivinnuni burtur í at kalla einki, og nú er tað bilasølan, sum steðgar upp.

Spaniumenn keyptu 63.000 bilar í síðsta mánað ímóti 125.000 í november í fjør, so afturgongdin er heili 49,6 prosent. Bilasølurnar siga, at tað er vorðið rættiliga trupult hjá fólki at fáa fígging til at keypa bil, og tá 80 prosent av øllum bilum verða seldir við útgjaldi og avdráttarskipan, fær tað beinan vegin stóra ávirkan, um fíggingarmøguleikarnir versna.

Fleiri av teimum stóru bilverksmiðjunum hava deildir í Spania, og Ford, General Motors og Volkswagen hava boðað frá, at tey fara at lata deildir í Spania aftur og at senda fólk til hús.



*Spanska bilasølan er minkað niður í helvt*
*(Mynd: AFP)*